Jørgen Niclasen
vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(Avtøka av stigvísu minkingini av uttanlandsfrádráttinum)

§ 1

Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, løgtingslóg nr. 39 frá 16. mai 2024, løgtingslóg nr. 145 frá 20. desember 2024 og løgtingslóg nr. 75 frá 30. apríl 2025 verður § 33, nr. 13 orðað soleiðis:

"13) 30% av skattskyldigari inntøku, sum er fevnd av § 25 b, stk. 1, tó í mesta lagi kr. 120.000."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2025.

Almennar viðmerkingar
Við løgtingsmáli nr. 37/2023 varð ásetingin í § 154 b í skattalógini strikað og uttanlandsfrádrátturin eftir § 33, nr. 13 minkaður munandi yvir nøkur ár. Síðan tá hevur landsstýrið, uttan um Løgtingið, men bert við kunngerð, broytt linkingarhátt fyri lønarinntøkur hjá skattaborgarum, sum arbeiða í øðrum Norðurlondum enn Danmark og Grønlandi.

Alt hetta merkir, at serliga føroyingar, sum arbeiða í Norra ella sigla við norskum skipum, fáa eina methøga skattahækking. Hetta hendir samstundis, sum alment lønt í Føroyum, serliga tey háløntu, hava fingið methøga lønarhækking frá landsstýrinum.

Tey, sum arbeiða í Norra ella sigla við norskum skipum, hava seinastu árini fingið eina munandi lønarlækking, tí virðið á norsku krónuni er minkað munandi. Methøga skattahækkingin á hesi somu er steinur oman á byrðu.

Havandi í huga, at tað seinnu árini er vorðið munandi dýrari at liva, tykist átakið hjá landsstýrinum sera órímiligt. Tær familjur, sum hava hesar inntøkur sum lívsgrundarlag, fara at líða.

Uppskotið er saman við øðrum løgtingsmáli um at innføra § 154 b frádráttin aftur, ið verður lagt fram samstundis sum hetta málið, við til at steðga og hjá øðrum minka um methøgu skattahækkingina.

Fram til 1. januar 2024 høvdu fólk, sum arbeiða í útlandinum, ein skattafrádrátt upp á 30% av skattskyldigu inntøkuni, tó í mesta lagi 120.000 kr. Í desember í 2023 samtykti Løgtingið at minka hámarkið stigvíst við 24.000 kr. um árið úr 120.000 kr. niður í 48.000 kr.

Við hesum uppskoti verður stigvísa minkingin av frádráttinum avtikin við afturvirkandi kraft til 1. januar í ár, soleiðis at frádráttarloftið aftur verður 120.000 kr.

Talan er um fólk, sum noyðast at verða burtur frá síni familju helvtina av árinum. Samanborið við okkara grannalond hava hesar inntøkur nógv størri týdning fyri búskapin, tí í mun til fólkatalið eru lutfalsliga fleirfalt so nógvir íbúgvar, ið arbeiða í útlandinum, sum tað er hjá okkara grannalondum.

Talan er um pening, sum kemur inn í landið til nýtslu. Peningur, sum kann samanberast við útflutning av vørum. Munurin er tó, at við útflutningi av vørum er ein framleiðslukostnaður, meðan við uttanlandsinntøkum er eingin útreiðsla.

Kanningar vísa, at skattur er tað økið, sum hevur størstu ávirkanina á, hvat fólk gera.

Føroyingar, sum sigla undir donsku DIS-skipanini, rinda ongan skatt í Føroyum. Meðan føroyingar, sum sigla við norskum reiðaríum, rinda skatt í føroyum. Við munandi skattahækkingini á hesi seinni nevndu, frætta vit longu nú, at hesi søkja starv hjá donskum reiðaríum, t.v.s. til eina skipan við ongum skatti til Føroyar.

Øll okkara grannalond hava frádráttir fyri uttanlandsinntøkur. Tað merkir, at tað er stórur figgjarligur fyrimunur fyri okkara íbúgvar, sum arbeiða í útlandinum, at flyta. Longu nú frætta vit, at heilar familjur eru fluttar til Danmarkar og til Norra.

Hjá nógvum er neyðugt at gera okkurt. Fyrst er lønin lækkað munandi av lækkaðum norskum gjaldoyra, og so kemur munandi skattahækkingin omaná. Fíggjarlig trongstøða ger, at fólk mugu gera okkurt.

Her skal eisini viðmerkjast, at fólk, sum arbeiða í útlandinum ella sigla við útlendskum reiðaríum, verða hart skattað, um tey í frítíðini arbeiða í Føroyum. Tá verður uttanlandsinntøkan tikin við í skattaútrokningina í Føroyum, og tað vil siga, at tey fáa ongan botnfrádrátt og heldur ikki lágu skattaprosentini, men verða toppskattaði av fyrstu krónu tey forvinna í Føroyum.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Skattaálopið í 2023 á útisiglarar í Norra og fólk, sum arbeiða í Norra, skuldi sambært landsstýrinum geva landkassanum hægri inntøkur. Undir allari viðgerðini varð víst á, at hetta neyvan fór at halda, tí slík høg skattahækking fór at tvinga mong at flyta arbeiðið t.d. til aðra skattafría skipan sum DIS ella at fáa tey at flyta land.

Longu nú sæst sjón fyri søgn í uppgerð frá TAKS um skattskyldigar inntøkur. Áðrenn 2024 byrjar, hava 70 persónar valt at flyta arbeiði ella flyta land t.v.s. hava onga slíka inntøku. Men væl fleiri eru fluttir í árinum, tí skattskyldiga inntøkum frá hesum bólki er minkað 65 mió. kr. í 2024. Skattamissurin av hesum inntøkum er sannlíkt hægri enn inntøkuvøksturin, sum landsstýrið væntaði av skattahækkingini.

Hendan flyting av fólki fer at halda fram, um broyting ikki kemur í. Tí eru hesi uppskot við til at steðga inntøkumissinum hjá landinum. Tó tekur tað helst tíð at fáa hesi fólk aftur á skattskyldiga inntøku í Føroyum. Tað merkir, at uppskotini sum frá líður fara at tryggja hægri inntøkur, men fara at byrja við merkja minni inntøkur. Vónleyst er at meta um stutttíðarvirknað, men við tíðini eru uppskotini við til at tryggja landskassa og landi okkara størri inntøkur.

Ongar umsitingarligar avleiðingar eru av uppskotinum.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Ásetingin í § 33, nr. 13 verður broytt til tað, ið hon var, fram til 1. januar 2024. Loftið fyri uttanlandsfrádráttin verður sostatt hækkað til aftur at vera 120.000 kr. við virknaði frá 1. januar 2025.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 4. november 2025

Jørgen Niclasen